## EB/Streyma-venjarar halda fram

Tað verða eisini Piotr Krakowski og Sámal Erik Hentze, sum fara at venja EB/Streym komandi kappingarár. Teir báðir venjararnir vórðu í ár so sera nær við at føra liðið til fyrsta gullmerkið í søguni, men teir gjørdust nakrar fáar minuttir og stuttir í so máta. Komandi ár verður tó enn ein roynd gjørd í so máta skilst. Til hetta fara teir at hava á leið sama hópin, men tað tykist greitt, at onkur spælari skal finnast fyri Ronnie Samuelsen á miðvøllinum og Fróða Clementsen í verjuni, sum báðir rokna við at gevast við fótbóti á Formula-støði.



## Maradona sum landsliðsvenjari

Fótbóltssambandið í Honduras sigst vera áhugað í at seta Diego Armando Maradona í sessin sum landsliðsvenjari.
Áður hevur Maradona verið settur í samband við okkurt starv nær argentinska landsliðnum, men sjálvur hevur hann tó ongan tíð váttað hesi tíðindi. Men tað ger hann nú.

– Maradona hevur sagt okkum, at hann er til reiðar at átaka sær uppgávuna hjá okkum. Og tí eru vit sjávlandi áhugaðir í. Hann er um nakar maðurin, sum kann geva okkum eitt navn í altjóða fótbólti, sigur forsetin í fótbóltssambandinum í Honduras, Rafael Callejas við Reuters.

# vur fylla karmarnar



*Í NM-kappingini í summar var greitt, at alt størri feløg sýna føroyskum fótbólti áhuga. Ikki minst man tað vekja ans, at oddvitin í ungdómsdeildini hjá Chelsea, Frank Arnesen, var á føroyavitjan. Sum skylst er hettar bert ein av sera góðu kontaktunum jákup hevur í evropeisku stórfeløgunum*

hjá spælarunum, eitt nú við at fáa fólk hendanvegin at eygleiða leikaran og skipað fyri venjingaruppihaldum og tað kann eg best gera við sjálvur at hava kontaktina við útlendsku feløgini. Men tað er soleiðis at eg kann skapað møguleikan, men tí ítróttarliga stendur leikarin fyri og so er tað upp til hvørt einstakt felag at meta um leikarin er nakað fyri teir. Vegurin er ikki altíð so stuttur sum mong halda, tað kunnu teir leikarnir, ið hava roynt seg uttanlands, skrivað undir uppá. Tað krevur hart arbeiði og eina stóra trúgv uppá egin evnir.

– Og eg verði ofta spurdur hví er hasin og hasin ikki uttanlands. Tað eru nógv viðurskifti sum spæla inn, men ongin skal yvast í at feløgini í Evropa vita um Føroyar og føroysku leikarnir.

–Tá eg byrjaði í '98, arbeiddi eg saman við útlendskum umboðsmonnum. Men uttan at siga nakað negativt um tað, so var tað ikki altíð, at hesir góvu sær nóg stórar gætur um Føroyar og føroyskar spælarar. Ofta var møguligur peningavinningur tkin framum, og tí valdi eg fara í holt við at skipa mítt egna kontaknet. Tað er sera umráðandi at vit sum vilja føroyska fótbóltinum væl draga somu línu í menningini av fótbóltinum

### Menningin er avgerandi

tað hevur verið sjónligt at Jákup hevur góð sambond í Norðunlondum og Evropa sum heild. Eitt nú vóru nógv europisk stórfeløg millum tey vitjandi, tá U-17 NM varð hildið í Føroyum í summar.

Eitt, sum fólk í hesum sambandi ofta hava bitið merki í, er, at tað ofta eru stóru feløgini, sum leita eftir spælarum á slíkum stað. Men er tað ikki eins gott fyri ein ungan spælara at koma til eitt felag, har hann kann fáa møguleikan á besta liðnum, heldur enn at fara til eitt stórfelag, har talan aloftast bert verður um ungdómsella eykaliðsfótbólt?

– Er talan um blaðungan spælara, er tað sjálv menningin, sum hevur størsta týdningi, og møguleikin fyri hesum er ikki altíð eins stórur í tí minna felagnum. Tá er krøvini ofta, at tú rættiliga skjótt skalt verða á besta liðnum, og er hetta vil til at økja um trýstið á spælaran. Tá er ofta betri hjá einum ungum spælara at fara til eitt nú Manchester City. Møguleikin at fara til eitt minni felag eftir loknan sáttmála er kortini altíð til staðar.

– Og samstundis skal minnast til, at feløgini ikki gera hetta til stuttleikar. Er tað so, at eitt stórfelag keypir ein føroyskan spælara, so er tað eisini tí, at tey rokna við, at hesin hevur møguleikan at standa seg. Og tað er væl hetta, sum hevur størstan týdningin.

## Vilja styrkja felagið

Eftir at hava nýtt mestu orkuna til uppbyggjandi arbeiðið hesi fyrstu árini, metir Jákup, at tíðin nú er komin til at styrkja grundarlagið undir NAFA.

– Enn er einki endaligt komið upp á pláss. Men eg havi arbeitt við at styrkja um grundarlagið undir felagnum. Bæði fíggjarliga, men – ikki minst – ítróttarliga, sigur hann.

Hetta seinasta skal ætlandi gerast við at knýta fólk afturat felagnum, sum higartil hevur verið at kalla einstaklingavirksemi. Í fyrstu atløgu við at hava fólk í felagnum, sum kunnu vera við at menna leikarnar ítóttarliga.

**-mørk**

## Okkurt hendir í vetur

Nú sonevndu transfervindeyguni eru komin í altjóða fótbólt, eru onkur tíðarskeið náttúrliga meira deydlig enn onnur, tá talan er um spælarahandlar.

Men hóast tað ikki hevur verið so nógv at hoyra seinastu tíðina, so tykist Jákup avkláraður, tá spurt verður, um nakað er í væntu í heyst og vetur.

– Viðvíkjandi yngri spælarum verða helst onkrar venjingar á skránni. Bæði U-17 og U-19 eru júst liðug við sínar kappingar. Og tá fleiri av hesum spælarum samstundis hava uppgávur fyri síni felög, vilja vit helst bíða við venjingaruppihaldum uttanlands, til føroyska kappingin og landsliðsárið eru liðug. So tað verður ikki fyrr enn nú, at gongd veruliga kemur á sjónliga partin av felagnum.

**-mørk**